# FSF byrjar at senda í kvøld

**Fyrsta framleidda fótbóltssendingin hjá Fótbóltssambandinum verður send á Rás 1 í kvøld kl. 18.30**

NÝGGJ FÓTBÓLTSSENDING
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*



*Tá fyrsta sendingin hjá Fótbóltssambandinum fer í luftina í kvøld, verður tað ikki Ísak Mikladal, aðalskrivari ella Magnus á Stongum, FSF-nevndarlimur, men Uni Arge, ið verður vertur í nýggja FSF-studionum við Tórsvøll*
*Mynd: Jens Kristian*

Nú er komið so væl áleiðis við fyrireikingunum av nýggju fótbóltsrásini hjá FSF, at fyrsta sendingin fer í luftina á Rás 1 hjá Tele-varpinum klokkan 18.30 í kvøld. Í fyrsta umfari verður talan um tvær sendingar um vikuna – fríggjakvøld og mánakvøld. Sendingarnar verða ikki sendar beinleiðis, og ætlanin er ei heldur at senda frá dystum.Tó kann koma fyri, at onkur dystur verður vístur beinleiðis, m. a. steypafinalan mikukvøldið.

## Uni Arge vertur

Í fríggjakvøldssendingini verður í høvuðsheitum lagt upp til eina upptakt við samrøðum við leikarar og venjarar. Eisini verður kjak millum serkønar gestir, ið hava orðaskifti um ávís viðurskifti í lands- og steypakappingini. Onnur evni, ið verða nevnd, eru landsliðini og dómara- og venjaraviðurskiftini. Mánakvøldið verður tikið samanum fótbóltin, ið var, umframt kjak. Fyribils verður Uni Arge vertur í sendingunum, ið verða upptiknar á stovuhæddini hjá FSF-húsinum við Tórsvøll.

## Alternativt tilfar

Í tíðindaskrivi verður staðfest, at Fótbóltssambandið ikki ætlar at kappast við verandi fjølmiðlar um fótbóltin. Ístaðin verður strembað eftir at viðgera tað, sum fjølmiðlarnir ikki taka upp. Sostatt hevur óvanliga stigið hjá Fótbóltssambandinum einki beinleiðis at gera við ónøgdsemi mótvegis Kringvarpinum. Og alt bendir tískil á, at sáttmálin millum ÍSF og Kringvarpið um rættindi at senda og siga frá fótbóltsdystum verður undirskrivaður í næstum.

Í skrivinum verður eisini staðfest, at fyrsta árið er at rokna sum royndarár. Sum skilst, hevur Rás 2 veitt tekniska útgerðina.

TEMPUR
TRYKAFLASTENDE
MADRASSER OG PUDER

TILBOÐ
Spar 15% av øllum TEMPUR maddrassum í august mánaði





TAÐ LØNAR SEG AT SOVA VÆL
Gev tær sjálvum eina betri náttarlegu

SERTILBOÐ
– SPAR KR. 7.180,-
1 stk. TEMPUR Night seingjaramma 180x200 cm
2 stk. TEMPUR kombimaddrass 90x200x20 cm
2 stk. F-400 elevatiónsbotnar, 2 motorar
Í alt kr. 32.995,- (Vanligur prísur kr. 40.175,-)

SERTILBOÐ
– SPAR KR. 5.080,-
1 stk. TEMPUR Day seingjramma 180x200 cm
2 stk. TEMPUR Kombimaddrass 90x200x15 cm
2 stk. FEN elevatiónsbotnar, 2 motorar
Í alt kr. 23.995,- (Vanligur prísur kr. 29.075,-)

IDEmøblar
Vit hava heilt víst eisini okkurt til tín

Mánadag – Hósdag kl. 09.00 – 17.30
Fríggjadag kl. 09.00 – 18.00
Leygardag kl. 10.00 – 14.00

Falkavegur . 100 Tórshavn tel. 354680 fax. 354681